Álit

í

løgtingsmáli nr. 67/2022: Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd (Náttúruverndarlógin)

Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum, Ingilín Didriksen Strøm, hevur lagt málið fram tann 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð tann 24. mars er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 28. mars, 11., 14., 18., 21. og 28. apríl 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Føroya Náttúru- og umhvørvisfelag, Bóndafelag Føroya, Føroya Óðalsfelag, Høgna Hoydal, landsstýrismann í uttanríkis- og vinnumálum saman við Búnaðarstovuni og Ingilín Didriksen Strøm, landsstýrismann í umvhørvismálum saman við Umhvørvisstovuni.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hervør Pálsdóttir, Henrik Old, Kristianna Winther Poulsen, Kim Durhuus og Helgi Abrahamsen**)** tekur undir við málinum og hevur hesar viðmerkingar:

Um aldarskiftið kom ein arbeiðsbólkur til ta niðurstøðu, at vit hava ikki eina náttúruverndarlóg, ið nøktar tørvin á náttúrufyrisiting í Føroyum. Friðingarlógin er skrivað í 1950'unum og hevur verið nærum óbroytt, síðani hon varð samtykt í 1970. Skiftandi samgongur hava roynt at gjøgnumføra eina nýggja náttúruverndarlóg, men hetta hevur higartil ikki borið á mál. Hetta lógaruppskotið hevur mong ár á baki og hevur verið lagt fram í Løgtinginum fleiri ferðir og í ymiskum útgávum.

Galdandi lóggáva hevur víðar heimildir og er lítið fjølbroytt. Men hóast víðu friðingarheimildirnar eru tær ikki nýttar síðan 1980'ini. Galdandi lóggáva tekur eisini í størri mun hædd fyri sjáldsemi og vakurleikanum í náttúruni, heldur enn náttúruni og hennara vistskipanum. Við hesum uppskotinum verður náttúruverndin tikin úr friðingarlógini og løgd yvir í nýggju náttúruverndarlógina.

Uppskotið skipar karmarnar fyri nýggjari náttúrufyrisiting og økisvernd í Føroyum. Økisverndin er skipað við fimm ymiskum stigum av náttúruvernd, sum eru tjóðgarðar, landslagsverndarøkir, náttúrufriðøkir, lívøkisvernd og sjóverndarøkir.

Grundleggjandi fyri uppskotið er, at tað byggir á, at fyrisitast skal eftir einum vitanargrundarlagi og eftir lutfalli. Lutfall og eitt greitt endamál skal vera við verndartiltakinum.

Leisturin við nýggju náttúrufyrisitingini verður tann, at ein og hvør kann heita á landsstýrismannin um at skipa eitt møguligt verndartiltak, og landsstýrismaðurin tekur saman við náttúrufyrisitingini støðu til, um farast skal undir at fyrireika økisvernd.

Reglurnar um kunngerðir í samband við verndarøki eru væl greinaðar í lógini. Landsstýrismaðurin kann ikki gera, sum honum lystir, tá verndarøki skulu kunngerðast. Einstaka verndarøkið verður skipað í kunngerð sambært §§ 20-24 í lógini. Í kunngerðini skal endamálið við verndarøkinum ásetast. Somuleiðis skulu eisini ásetast náttúru- og mentanarvirðini, sum verndin skal røkja, og standurin, sum

verndin skal røkka. Mørkini um verndarøkið, ávirkaðar ognir og hvussu økið kann brúkast skulu eisini ásetast í kunngerð.

Áðrenn kunngerð um verndarøki verður orðað, skal verndarætlanin almannakunngerast. Eigarar og rættindahavarar skulu hava beinleiðis boð og fáa rímiliga freist at koma við viðmerkingum til verndarætlanina. Tá verndarætlan verður almannakunngjørd, skulu týdningarmestu avleiðingarnar, ið økisverndin væntast at fáa, eisini lýsast.

Í viðgerðini av lógaruppskotinum hevur verið ført fram, at hetta lógaruppskotið ger seg inn á ognarrættin hjá festibóndum og óðalsfólki og inn á rættindini at gagnnýta lunnindi. Tá verndartiltak skal gerast, verður ikki talan um at fremja ognartøku í samband við verndartiltakið. Talan verður heldur um ein avmarkaðan ræðisrætt, meðan verndartiltak verður framt. Endurgjaldsreglur eru ásettar í uppskotinum fyri mista inntøku av verndartiltakinum. Harumframt skulu umsitingarætlaninar í samband við verndartiltøk sambært serligu viðmerkingunum í uppskotinum endurskoðast 5. til 10. hvørt ár.

Uppskotið er harafturat orðað soleiðis, at eigarar og rættindahavarar skulu takast við í málsviðgerðina, tá verndarætlan skal gerast. Hetta verður staðfest í § 25.

Meirilutin leggur áherðslu á, at skal lógin fáa bestan virknað, eftir at hon er samtykt, so er tað av alstórum týdningi, at samstarvið verður gott millum náttúrufyrisitingina, eigarar og rættindahavarar og tey lokalu í økjunum. Tí hevur tað eisini týdning, tá verndarætlanir skulu almannakunngerast, at eigarar og rættindahavarar verða tiknir við í arbeiðið frá byrjan, sum eisini verður staðfest í § 25 í lógini.

Landbúnaðarlóggáva

Uppskotið til náttúruverndarlóg setir karmarnar fyri náttúruverndini og náttúrufyrisitingini. Uppskotið trumfar hvørki hagalóg ella landbúnaðarlóggávu, ið regulera umstøður og virksemi hjá bóndum ella óðalsfólki. Uppskotið ávirkar heldur ikki møguleikan hjá eigarum og festarum at velta eplir, kál, gularøtur o.a. til privat brúk ella vinnuligt. Tað verður hinvegin staðfest í § 16, stk 1, nr. 3 í uppskotinum, at tað krevst einki loyvi til slíka velting.

Málið um gongd í haga

Málið um gongd í haga fyllir nógv í almenna kjakinum – eisini í viðgerðini av náttúruverndarlógaruppskotinum – og tað er týdningamikið at sláa fast, at náttúruverndarlógin tekur ikki støðu til málið um gongd í haga. Hetta uppskotið broytir ikki upp á støðuna og tær reglur, sum eru galdandi í dag.

Í sambandi við bygging verða tað framvegis lokalu friðingarmyndugleikarnir, sum skulu geva loyvi. Lokalu friðingarnevndirnar og yvirfriðingarnevndin verða varðveittar at taka sær av teimum uppgávum, ið tær gera í dag, og náttúruverndin verður flutt úr friðingarlógini og yvir í náttúruverndarlógina.

Rættartrygdin verður styrkt

Rættartrygdin hjá rættindahavarum verður við uppskotinum styrkt. Eftir verandi friðingarlóg eru avgerðir hjá yvirfriðingarnevndini endaligar og kunnu ikki kærast. Við nýggju náttúruverndarlógini verður møguleiki bæði at royna kærumál í Føroya Kærustovni og at royna mál í Føroya Rætti.

Heimildir hjá landsstýrisfólkinum

Tað hevur verið ført fram í samband við uppskotið, at tað gevur landsstýrismanninum víðar kunngerðarheimildir og fríar teymar at gera, sum honum lystir. Hetta er ikki heilt rætt. Í §19 í uppskotinum er ásett, hvussu leisturin er fyri kunngerðir um verndarøkir, í §§ 20-24 er ásett, hvussu økisverndarmiðini verða skipað, og í §§ 25-26 er ásett, hvussu mannagongdin er, tá verndarætlanir skulu almannakunngerast. Tískil eru kunngerðarheimildirnar í hesum lógaruppskotinum ikki víðari, enn í øðrum lógaruppskotum við kunngerðarheimildum til landsstýrismenn. Av røttum kann sigast, at kunngerðarheimildirnar í hesum uppskotinum eru eitt vet strammari, enn vanligt er, tí at kunngerðarheimildirnar verða greinaðar, eins og víst omanfyri.

Harafturat er vert at leggja dent á, at allir landsstýrismenn og øll fyrisiting sambært lóg skulu fyrisita sakliga, og tað mugu vit hava álit á, at landsstýrismaðurin við umhvørvismálum og náttúrufyrisitingin eisini framhaldandi fara at gera.

Vitan og náttúrudátur

Náttúruverndarlógin byggir á, at alt, ið verður framt eftir lógini, skal byggja á eitt vitanargrundarlag. Tað er tí eyðsæð, at tað er tørvur á, at náttúrufyrisitingin hevur atgongd til náttúrudátur og vitan um okkara náttúru og hennara vistskipanir. Meirilutin ger vart við, at tað hevur týdning ikki at skapa dupultfunktiónir, tá tað snýr seg um gransking í náttúruni og innsavnan av vitan og náttúrudátum. Tí hevur tað stóran týdning, at náttúrufyrisitingin og náttúrudeildirnar á Tjóðsavinum samstarva væl, og at stóra arbeiðið, ið Tjóðsavnið ger, ikki verður gloymt, tá vitanargrundlagið fyri náttúrufyrisiting í Føroyum verður gjørt.

§ 5 og § 29 – onnur týðandi samfelagsatlit

Meirilutin heldur tað hava stóran týdning, at grundtankin við hesum lógaruppskotinum er, at lógin skal tryggja náttúruvernd. Við náttúruvernd og náttúrufyrisiting verður altíð tikið atlit til onnur týðandi samfelagsáhugamál. Soleiðis er tað eisini í londunum rundan um okkum.

Tað hevur tó týdning at sláa fast, at náttúruverndarlógin kann ikki brúkast til at veita nøkrum atgongd til jørð ella øki hjá øðrum. § 5 og § 29 í náttúruverndarlógini geva ikki náttúrufyrisitingini ella landsstýrismanninum rætt til at geva alifyritøkum, ferðavinnufyritøkum ella orkufeløgum rættindi til ávís økir. § 5 og § 29 í uppskotinum lata ikki upp fyri, at givin kann verða atgongd til nakað, ið ikki er loyvt frammanundan. Mál um gongd í haga, bygging og líknandi hava einki við náttúruverndarlógina at gera.

Tá meting verður gjørd eftir § 5, ella undantak givið eftir § 29, eigur hetta bert at verða gjørt av væl grundaðum ávum. Tað hevur týdning, at náttúran og náttúruverndin ikki standa sum tann veikari parturin í eini slíkari meting.

Tá samanum kemur heldur meirilutin, at tíðin er búgvin til, at vit fáa eina dagførda náttúruverndarlóg, ið tekur atlit til náttúruna og vistskipanir hennara. Náttúran er í stóran mun grundarlagið undir mongum av vinnunum her í Føroyum, og tískil hevur tað eisini týdning, at náttúran verður fyrisitin burðardygt, so at framtíðar ættarlið eisini fáa ágóðan av náttúruni og øllum tí, hon gevur okkum.

Friðingarheimildir

Lógaruppskotið er viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 68/2022 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing (Striking av friðingarheimildum o.a.), og við tí uppskotinum verða náttúrufriðingarheimildirnar fluttar úr friðingarlógini og í nýggju náttúruverndarlógina. Frameftir fara staðbundnu friðingarnevndirnar at viðgera mál um loyvi til bygging, vegagerð og annað við kærumøguleika til yvirfriðingarnevndina.

Friðingarheimildirnar í friðingarlógini eru ikki brúktar síðan 1988, og tískil snýr tað seg ikki um nakra stórvegis broyting í arbeiðsuppgávunum hjá staðbundnu friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Steffan Klein Poulsen og Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur) ásannar, at tey, sum varða av jørðini í Føroyum, taka ikki undir við uppskotinum, og at tey staðiliga mæla frá at samtykkja tað. Eftir at hava viðgjørt málið í nevndini, lisið rúgvismikla tilfarið og hoyrt tey ymisku sjónarmiðini, er minnilutin komin til somu niðurstøðu.

Tað er óskiljandi, at fleiri landsstýrismenn bera lógaruppskot um náttúruvernd í Løgtingið uttan at tey, sum varða av høgunum, eru tikin við í fyrireikandi arbeiðið.

Hesi umsita dagliga hagar, lendi og djóralív, og eingin dugir at umsita hagarnar so væl og so burðardygt sum tey, ið eiga og kenna sín haga. Tað gongur sjón fyri søgn, hvussu góð staðbundna náttúruverndin hevur verið seinastu fleiri hundrað árini, og hava Føroyar seinastu árini ikki júst marknaðarført land okkara sum "unspoiled, unexplored and unbelievable"?

Orsøkin til, at føroyska náttúran er so "unspoiled", er, at tey, ið hava ansað eftir henni, hava fingið frálæru at umsita jørðina burðardygt frá sínum forfedrum. Tí er altavgerandi, at tey framhaldandi hava fullan ræðisrætt yvir teirra ogn.

Uttangarðsjørðin og tey lunnindi, ið liggja til jørðina, eru væl skipað við lóggávu og ikki minst við siðvenju, soleiðis sum bygdasamfeløgini hava skipað seg kring landið.

Tað ger ikki rættarstøðuna betri ella tryggari, at lógaruppskotið er týtt úr einari norskari lóg, Lov om forvaltning av naturens mangfold. Bæði rættarskipanin og jarðarviðurskiftini eru púra øðrvísi í Noregi. Í Føroyum er øll uttangarðsjørðin landbúnaðarjørð og bit fyri seyð, neyt, ross og gæs. Í Noregi harafturímóti er meginparturin av lendinum skógur og hálendi. Tað er eisini merkisvert, at lógaruppskotið als ikki nevnir seyð, neyt, ross og gæs við einum orði.

Minnilutin staðfestir, at uppskotið flytir ræðisrættin frá teimum, sum eiga ella leiga jørðina, til ein einstakan landsstýrismann ella tey, sum landsstýrismaðurin setur til at umsita lógina, og minnilutin er av teirri fatan, at ásetingarnar um at útleggja verndarøkir til ymisk endamál ger seg inn á grundlógartryggjaða ognarrættin.

Tað er eisini ógreitt, hvussu hesi sokallaðu verndarøkir verða hegnaði inni, so tey eru vard fyri seyði, neytum, rossum og gásum, og hvussu og hvør skal røkja hetta. Alt hettar skapar ótryggleika, tí nú fer onkur annar enn tey, sum eiga og røkja hagarnar, at seta dagsskránna fyri, hvussu hagin skal skipast, og aldargamla siðvenjan í júst tí haganum verður skúgvað til viks.

Minnilutin heldur tað ikki vera rætt at flyta heimildirnar at friða náttúruøki frá friðingarnevndunum til ein almennan myndugleika. Skipanin við lokalu friðinarnevndunum hevur virkað væl. Aftur her leggur uppskotið upp til, at tað lokala verður skúgvað til viks, og onkur annar, sum ikki kennir lokalu viðurskiftini, tekur avgerðirnar sentralt.

Jørð og jarðarviðurskifti fylla nógv og hava stóran týdning fyri fleiri túsund fólk úti kring alt landið. Tí ber ikki til at samtykkja eitt uppskot, sum tey, ið varða av jørðini í Føroyum, eru ímóti. Skulu vit gera okkum nakrar vónir um at verja náttúruna, hava vit brúk fyri at skapa semju og samstarv við júst tey fólkini, sum hava best skil fyri lokalu náttúruverndini úti í teimum ymisku bygdasamfeløgunum.

Vit hava brúk fyri lokalari undirtøku og luttøku, og tað fæst ikki við hesum lógaruppskotinum, tá mótstøðan móti tí er so stór. Vandin er, at ikki bara staðbundin mentan og staðbundin vitan gjøgnum nógv ættarlið fer fyri skeytið, men eisini sjálv staðbundna náttúruverndin. Tá er jú einki vunnið.

Minnilutin stúrir stórliga fyri avleiðingunum, um Løgtingið samtykkir eina rammulóg við so víðfevndum heimildum til miðfyrisitingina, har allar avgerðir um vernd av náttúruøkjum skulu byggja á vitan, sum stovnur hjá miðfyrisitingini skal savna í ein vitanargrunn. Tað er rættiliga ivasamt, um ein tílík akademisering av náttúruverndini er vegurin fram; tí hetta hevur uttan iva ein høgan rakstrarkostnað við sær, og samstundis kemur ikki nóg greitt fram, hvussu staðbundna mentanin og vitanin fáa pláss í hesum vitanargrunni.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 9. mai 2023

Hervør Pálsdóttir formaður	Helgi Abrahamsen næstformaður	Henrik Old
Steffan Klein Poulsen	Kristianna W. Poulsen	Kim Durhuus

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur